VIÐMERKINGAR

# Flogvøllur og undirsjóvartunnil

**Óli Mikkelsen**

Eg takki Alfred Olsen fyri áhugaverda grein 18. januar, har fleiri upplýsingar koma fram um flogvøll og undirsjóvartunnil. Ikki minst skal hann hava takk fyri at kostnaðarmetingarnar frá kanningini um flogvøll frá 1963 koma fram. Tað undrar meg, at flogvøllur á Sandoynni er mettur til 16 mió. kr. móti 25 mió. kr. á Skorhæddini. Leysliga hevði eg mett at 2000 m. flogbreyt á Skorhæddini í landnyrðing/útsynning var lættari at gera enn tilsvarandi flogbreyt í Søltuvík; men kanska er meira tikið við á Skorhæddini. At flogvøllur á Glyvursnesi er nógv dýrari (57 mió. kr.) ógvist eg ikki við. Útbygging í Vágum var mett til 32 mió. kr. Tað er meir enn nýggj floghavn á Skorhæddini kostar. Tað mátti verið sjálvsagt, at vit byggja eina betri floghavn fyri minni íløgu, enn tað kostar at skoyta nakrar metrar uppí flogvøll í Vágum. Kanningin frá 1963 er eitt gott útgangsstøði, men treingir til at metast av nýggjum, tí nógv er broytt seinastu 40 árini, ikki minst viðvíkjandi tekniskum hentleikum.


Flogvøllur og undirsjóvartunnil

**Undirsjóvartunnil**
Fast samband millum Suðurstreym og Eysturoy hevur alstóran týdning fyri framtíðar Føroyar, og eigur at gerast sum skjótast. Hesum grundgevur Alfred Olsen væl fyri. Grundgevingarnar fyri at undirsjóvartunnilin skal leggjast um Strendur og enda í Runavík eru meira ivasamar. At fáa nógv økta ferðslu gjøgnum Runavík, kann ikki vera rætt. Har er nóg trupult sum er. Nýggjur vegur má gerast í øllum førum. Enn ber til at leggja hann omanfyri húsini yvir móti Lambareiði.

Undirsjóvartunnil Hvítanes, Strendur, Runavík verður 10,2 km til longdar. Strekkið úr Sandvíkum til eystara enda á Toftavatni er undir 7 km. Munurin er sostatt góðar 3 km. Skálafjørðurin um Saltnesgrynnuna er um 800 m. breiður. Hendan farleiðin má loysast leys av meginbergholinum. Tá fáa strandingar um 11 km til Havnar, meðan flest onnur fáa millum 5 og 6 km styttri leið, enn um farast skal um Strendur. Høvuðssakin er, at her er talan um íløgu í framtíðar møguleikar í Føroyum og at funnið verður tann besta loysnin fyri allar Føroyar.




# Motorvegurin, ið gjørdist til blindveg

**Kristina Háfoss**
*Fólkatingsvalevni Tjóðveldisfloksins*




Nú fólkatingsval skjótt er í hondum hava nakrir flokkar lagt fram valskrá sína. Sambandsflokkurin var fyrstur, og ikki óvæntað er høvuðsevni Sambandsfloksins, at hesin flokkur vil seta í verk Nýskipanaruppskot sítt, ið sigst at verða ein nýggj skipan millum Føroyar og Danmark. Veruleikin er, at tað er sera trupult at finna nakra nýskipan í hesum uppskotið, og tað sum verri er, er at hetta uppskot Sambandsfloksins bindir Føroyar enn meira niður enn heimastýrislógin ger.

**Hvar er nýskipanin í Nýskipanaruppskotinum?**
Heitið Nýskipanaruppskot ber boð um nýskipan, men tá umrøður hetta uppskot Sambandsfloksins, so ber snøgt sagt ikki til at finna nakra nýskipan.

- Kongshúsið, Grundlógin, Uttanríkismál, Verjumál, Gjaldoyra og Rættarskipanin skulu verða felagsmál, men harumframt staðfestir Nýskipanaruppskotið, at nevndu mál IKKI skulu kunna yvirtakast av føroyingum.
- Danski ríkisborgaraskapurin skal varðveitast — eins og nú.
- Danska fólkatingsumboðanin skal varðveitast — eins og nú.
- Onnur málsøki skal heimastýrið hava møguleika til at yvirtaka — eins og nú.
- Gjaldskylda fylgir við yvirtøkuni — eins og nú.

Uppskot Sambandsins: Rættarmál og uttanríkismál skulu IKKI kunna yvirtakast.

Hetta uppskotið er sambært Sambandsflokkinum ein nýskipan og sum tikið verður til á teirra heimasíðu: "motorvegurin" inn í framtíðina. Og hetta má undra mangan. Tí sum nevnt, so fer hetta uppskotið longur á sambandsleið enn heimastýrislógin. Størsta nýskipanin er, at uppskotið staðfestir, at ein røð av málum IKKI skulu kunna yvirtakast — eitt nú rættarmál, ið føroyingar undir undanfarnu samgongu fyrireikaðu seg til at taka aftur til Føroya.

Verandi heimastýrislóg staðfestir onki um, at møguligt IKKI er at yvirtaka nøkur málsøki. Hetta vil til eina og hvørja tíð verða upp til politiska myndugleikan at avgera. Eitt nú eru málsøki yvirtikin — Skipaeftirlitið og Havumhvørvið — ið ikki eru nevnd í heimastýrislógini. Arbeitt varð somuleiðis við at yvirtaka løgregluna og rættarskipanina undir undanfarnu samgongu. Men hetta arbeiðið hevur núverandi samgonga steðgað. Leggjast kann afturat, at í valskrá Sambandsfloksins til fólkatingsvalið verður enntá staðfest, at: "Sambandsflokkurin sær samgonguskjalið hjá verandi samgonguflokkum, sum eitt gott amboð at nýta, fyri at seta Nýskipanaruppskotið í verk". So vita vit tað.

**Føroyski uttanríkispolitikkurin rekast úr Brússel ?**
Nýggjasta ætlanin hjá Sambandsflokkinum er, at taka fult undir við at føroyskur uttanríkispolitikkur skal umsitast og stjórnast í Brússel — hjá ES myndugleikum. Eisini hetta metur flokkurin verða til gagns fyri føroyingar. Tykist sum sambandshugsjónin er grundað á, at onnur — tvs. myndugleikar í Danmark og ES — eru betur til at umsita grundleggjandi føroysk mál, enn føroyingar sjálvir.

**Motorvegurin, ið gjørdist til blindveg**
Sum væntað má staðfestast, at tann skipan, ið Sambandsflokkurin kallar "motorvegur" í veruleikanum er ein "blindvegur". Tí verður Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins fylgt og staðfest, so koma føroyingar ikki at fáa møguleika fyri at koma víðari á sjálvbjargnisleið — og als ikki tá umrøður eina røð av týðandi og grundleggjandi málum, so sum rættarskipan, trygdarmál og uttanríkismál Føroya, ið verða flutt til ES at umsita — stendur tað til Sambandsflokkin.

Tá heldur velja ein veruligan "motorveg" inn í framtíðina — ein veg, ið leiðir fram ímóti viðurkenning, vøkstri og virðing - ein veg, ið gevur okkum fulla ábyrgd av egnum landi.

Hesum vegi fer Tjóðveldisflokkurin at slóða fyri á Fólkatingi.

Les meira á heimasíðu míni: www.hafoss.com

# Hví eru politikarar og serfrøðingar so ósamdir í Føroyum?

**Finn Jensen**

Hetta er evni, sum ivaleyst hevur fingið onnur enn meg at gruna um seinastu árini. Havi ofta havt hug at lagt upp til eitt kjak hesum viðvíkjandi, og nú val stundar til er kanska rætta tíðin til tað.

Ilt er at siga, um talan er um eitt serføroyskt fyribrigdi, men tað er við at vera undantakið heldur enn reglan, at okkara fólkavaldu eru á einum máli við serfrøðingarnar her á landi, og ein kann av røttum spyrja hví so er.

Dømini eru nógv, eitt nú innan fiskivinnuna, har tað nærum altíð verður handla øvutt í mun til tað serfrøðingarnir tilráða. Eitt annað dømi er hvussu fráfarandi formaðurin í búskaparráðnum hevur verið viðfarin. Feskasta dømi er heilt greitt Suðuroyarætlanin hjá samgonguni, sum at kalla ikki fær undirtøku hjá nøkrum, sum hevur fakligt innlit í slík mál. Og sum kuriosum kann nevnast at tað fleiri ferð er komið fyri, at løgtingsmenn og landsstýrismenn sáða iva um úrskurðir hjá Løgtingsins Umboðsmanni. Hetta er sera gjarvt, og hevði neyvan verið tolt nakra aðra staðni enn í Føroyum.

Hví henda støðan er uppstaðin sum dagligdagskostur í Føroyum, kann eftir mínum tykki bert hava tvinnar orsøkir. 1) Talan kann vera um at fólksins útvaldu royna at tekkjast veljaranum, ella 2) okkara politikarar eru ikki nóg dugnaligir.

Viðvíkjandi tí fyrra, er ikki nógv at gera við, annað enn at veljarin má verða vitugur um hesar lótir, tá hann setir sítt álit á politikaran.

Hinvegin, vita vit, at innan fótbólt, og annan ítrótt fyri tann skuld, finnst kanska eitt talent fyri hvørjar 10.000 íbúgvar. Hetta er ivaleyst eisini galdandi í politikki, og tað merkir allarhelst at vit hava undir 5 evnaríkar politikkarar í Føroyum.

Hesin trupulleiki er ikki hin sami í øðrum londum, av tí at tey eru so nógv fólkaríkari enn vit, og tí er trupulleikin heldur ikki so eyðsýndur sum her heima hjá okkum.

Ein gongd leið at bøtt um støðu politikarana í Føroyum kundi verið, at sett eina serliga útbúgving fyri politikarar á stovn, sum kundi snúð seg um løgfrøði, búskaparfrøði og samfelagsfrøði. Kravið kundi til dømis verið at ein og hvør sum kom inn á ting, skuldu tikið hesa útbúgving fyrsta árið viðkomandi sat á tingi.

Eg eri vísur í, at hetta hevði bøtt um støði á politiska vídvøllinum munandi í framtíðini.